# Ársfrágreiðing 2025

Keypsportalurin




Fororð ........................................ 4

Hvørji eru vit? ........................................ 6

– Eitt virkið ár ........................................ 8

– Rammusáttmálar ........................................ 10

– Spart milliónaupphædd ........................................ 11

– Trý undantøk um mánaðin ........................................ 12

– Nýggj manning ........................................ 14

Mál fyri 2026 ........................................ 16

– Fleiri við á ferðina ........................................ 18

# Fororð

*Pengarnir hjá skattgjaldaranum skulu verða umsitnir skynsamt, við virðing og á bestan hátt.*

Tað er andin í tí, sum vit gera í Keyp landsins. Eitt mál, sum gongur hond í hond við politisku ynskini um at reka landshúsarhaldið skynsamari og effektivari.

Og tað er at gleðast um, at almennir stovnar eru byrjaðir at taka almenn útboð til sín.

**„Talið av útboðum farna árið á Keypsportalinum er nevniliga hægri enn nakrantíð áður."**

Harumframt blivu átta rammuavtalur gjørdar í fjør, og umsitur Keyp landsins nú 12 rammusáttmálar fyri keyp av brúksvørum. Tað eru tvífalt so nógvir sum í 2024.

Hetta hendir eftir, at Landsgrannskoðanin áður hevur víst á, at tað hevur haltað við almennum útboðum.

Millum annað í ársfrágreiðingini fyri 2024, tá ið hon skrivar: „í fleiri førum eru reglurnar um alment útboð ella tilboðsfyrispurningar ikki hildnar. Fleiri almennir stovnar nýta ikki Keypsportalin og hava heldur ikki brúkt møguleikan at søkja um undantøku at bjóða uppgávur út."

Økta talið av útboðum bendir á, at hetta er um at broytast, og í 2026 verður upp aftur meira ferð sett á arbeiðið at effektivisera almenna raksturin og fáa sum mest burturúr hvørji einastu skattakrónu.

Sum ein liður í tí verður heimasíðan í næstum dagførd, so tað verður uppaftur smidligari hjá stovnum at bjóða út og hjá veitarum at bjóða upp á uppgávur. Harumframt verður miðað eftir at gera fleiri rammusáttmálar.

Alt við tí endamáli, at landshúsarhaldið verður ríkið skynsamari og at hvør einasta króna verður handfarin við størstu virðing.

**Hallur Thomsen**
**deildarleiðari í Keyp landsins**

# Hvørji eru vit?

*Keyp landsins er amboðið hjá landstýrinum at skipa almenna keypi av vørum og tænastum.*

- Vit eru sparringspartnari, tá ið stovnar vilja bjóða út vørur og tænastur
- Vit vegleiða, tá ið stovnar og veitarar hava spurningar
- Vit tryggja, at skattgjaldarin fær sum mest fyri sínar skattakrónur
- Vit virka fyri gjøgnumskygni í almennum keypi
- Vit skapa fyritreytir fyri, at nýggir veitarar sleppa framat
- Vit skapa rammur fyri virknari kapping á marknaðinum
- Vit veita tøkniliga pallin til útboð

Keyp landsins virkar við trimum málum fyri eyga:

1. Vit skulu tryggja gjøgnumskygni í almennum keypi. Hetta verður m.a. gjørt við greiðum mannagongdum og útboðstilfari og freistum, sum tryggja, at eingin munur verður gjørdur á veitarum. Harumframt verða undantøk frá keypsrundskrivinum løgd út á heimasíðuni.

2. Vit skulu fáa sum mest burturúr pengunum hjá skattagjaldaranum. Hetta verður gjørt við at skipa útboð av vørum og tænastum, ráðgeva stovnum og gera rammusáttmálar.

3. Vit virka fyri at stimbra kappingina á føroyska marknaðinum. Tað verður gjørt við at eggja almennum stovnum at bjóða út ella biðja um tilboðsfyrispurningar. Tað tryggjar virkna kapping, har munur ikki verður gjørdur á fyritøkum.

Keyp landsins er skipað sum deild á Gjaldstovuni. Á Keypsportalinum ber til at síggja øll útboð og fáa kunning um nýggjastu undantøkini.

# Eitt virkið ár

*2025 gjørdist eitt virkið ár hjá Keypi landsins. Met nógv útboð vórðu løgd út á Keypsportalin, nýggj starvsfólk blivu sett, farið var undir at menna nýggja heimasíðu og fleiri rammusáttmálar blivu gjørdir við veitarar.*

## Keypsportalurin

Meðan talið av útboðum seinastu árini hevur ligið rættiliga javnt millum 40-50 útboð um árið, so gjørdist 2025 árið, tá ið talið tók eitt lop uppeftir.

Við árslok vóru 74 útboð skrásett á Keypsportal-inum. Hetta er 61 prosent meira enn í 2024.

Verður hugt gjøllari at tølunum sæst, at tað vóru níggju almennir stovnar, sum brúktu Keypsportalin í 2025. Av teimum 74 útboðunum áttu Landsverk 30 og Gjaldstovan 19.



Vøkstur í tali av útboðum (2021-2025)




Útboð í 2025 - fimm stovnar við flestum útboðum



# Rammusáttmálar

*Av teimum 19 útboðunum, sum Gjaldstovan bjóðaði út í 2025, vóru níggju rammusáttmálar.*

**Teir níggju rammusáttmálarnir eru fyri:**

- Kopipappír
- Akfarstryggingar
- Ferðatryggingar
- Sápur
- Battarí
- Prentarar og tónarar
- Brúkspappír
- Einnýtis búnýti
- Posar

At gera fleiri rammusáttmálar fyri landsins stovnar hevur verið eitt av málunum, síðan Keyp landsins varð sett á stovn.

Rammusáttmálar verða gjørdir fyri vørur, har kostnaðurin er so mikið lítil, at tey einstøku keypini ikki flyta tað stóra, men har samanlagda mongdin hjá landsins stovnum kortini verða so mikið høg, at pengar eru at vinna við at skipa keyporkuna hjá stovnunum í eitt felags útboð.

## 64 tilboð

Í summar vórðu seks rammusáttmálar bodnir út samstundis.

Undirtøkan frá vinnuni var framúr góð. Tá ið avtornaði høvdu 15 fyritøkur givið 64 tilboð upp á rammuavtalur um at keypa battarí, brúkspappír, einnýtis búnýti, posar, sápur, reingeringútgerð og nitrilhandskar.

Sparingin er eisini trivalig, tí í 2024 keypti landið hesar vørur fyri slakar fimm milliónir krónur. Var keypt eftir nýggju rammusáttmálunum, hevði talan verið um eina sparing upp á hálva triðju millión. Í prosentum er talan um eina sparing upp á umleið 53 prosent.

> „Av teimum níggju rammusáttmálunum, sum blivu bodnir út í fjør, var tann lægsta sparingin fyri landsins stovnar 20 prosent, meðan tann hægsta var ein sparing á 58 prosent.“

**20%** lægsta sparing

**58%** hægsta sparing

# Spart milliónaupphædd

*Metta sparingin fyri nýggju rammusáttmálarnar liggur um slakar tríggjar milliónir krónur árliga.*



# Trý undantøk um mánaðin

*Sambært rundskrivinum hava stovnar, um ávísar fortreytir verða loknar, loyvi at søkja um undantak frá at bjóða út ella biðja um tilboð.*

Øll undantøk verða skrásett og løgd út á Keypsportalin. Hetta verður gjørt fyri, at borgarar, fyritøkur og onnur kunnu fylgja við og siga frá, um mett verður, at undantak verður givið grundað á skeivar fortreytir.

## Dømi um undantøk

Í alt blivu 37 undantøk veitt í 2025. Gjaldstovan átti 15 av hesum, meðan Sjúkrahúsverkið átti ellivu.

Hetta er væl fleiri undantøk enn áður. Síðan farið var undir at skráseta undantøk á Keypsportalinum í 2020, hevur talið av undantøkum ligið millum 6 og 8, fyriuttan í 2022, tá ið 17 undantøk vórðu játtað.

## Dømi um játtað undantøk í 2025.

### Dømi 1

**Mál: ETSI-góðkenning av Samleikanum**
Orsøk: Fíggjarmálaráðið viðgjørdi umsóknina. Eingin føroyskur veitari bjóðar tænastuns, tí bleiv undantak givið at biðja um tilboð frá tveimum veitarum í Evropa.

### Dømi 2

**Mál: Keypa el-buss**
Orsøk: Undantak givið frá rundskrivinum um keyp av el-bilum, av tí at eingin veitari kundi bjóða el-buss.

### Dømi 3

**Mál: Timburuppgáva**
Orsøk: Undantak givið frá at bjóða arbeiðið út, tí talan er um timburuppgávu, sum er framhald av einari uppgávu, sum longu er boðin út.

Tal av undantøkum 2020-2025






# Nýggj manning

*2025 gjørdist eisini eitt ár við nýggjari manning á Keypi landsins.*

Fyrst í nýggja árinum bleiv ein leiðari settur í starv, og í august bleiv ein fulltrúi settur, soleiðis at tað í dag eru tvey fólk í starvi.

Ein stórur partur av arbeiðinum hjá Keypi landsins í ár hevur verið at ráðgeva stovnum um útboð. Hetta er nakað, sum væntandi fer at fylla uppaftur meira næstu árini.





# Mál fyri 2026

*Tað skal gerast smidligari og betri fyri allar partar at bjóða út uppgávur og vørur. Tí verður ein nýggj heimasíða til Keypsportalin ment.*

Hetta merkir, at fyri stovnar skal tað vera lættari at fáa ráðgeving og kunning um útboð, tað skal vera lættari at stovna og umsita útboð og tað skal gerast lættari at lesa rammusáttmálar og keypa tær vørur, sum eru fevndar av hesum sáttmálum.

Fyri veitarar skal tað gerast lættari at stovnar brúkarar, fylgja við viðkomandi útboðum og bjóða upp á tey útboð, sum liggja úti.

„Og fyri borgarar skal meira gjøgnumskygni valda, og meira skal fáast fyri teirra skattapengar.“

# Fleiri við á ferðina

*Ætlanin er at góða gongdin í 2025 heldur fram, so at enn fleiri uppgávur fara í útboð, umframt at fleiri stovnar fáa royndir við at bjóða út.*

Fyri at náa hesum er ætlanin at leggja uppaftur størri dent á ráðgeving, kunning og stovnsvitjanir.

Tað eru fleiri av landsins stovnum, sum lítið og einki hava boðið út áður. Tí liggur eitt ávíst arbeiði í at broyta eina mentan, so at útboð og undantøk verða ein enn meira inngrógvin partur av almennu umsitingini.

### Kommunalt samstarv

Síðan Keyp landsins bleiv sett á stovn hava tað fyrst og fremst verið landsstovnar og aðalráð, sum hava brúkt pallin.

Sjálvt um rundskrivið fyri keyp av vørum og tænastum staðfestir, at kommunur kunnu brúka Keypsportalin, hevur hetta ikki verið brúkt.

Bert eitt kommunalt útboð er í yvirlitinum, og er tað frá 2015, tá ið Kommunufelagið bjóðaði út ein rammusáttmála fyri blæur saman við Almannaverkinum og Landssjúkrahúsinum.

Ætlanin er at kunna kommunur um henda møguleika í 2026.

„Við Keysportalinum hevur Gjaldstovan ment mannagongdir og ein pall, sum eru snikkað til almenn útboð, og er pallurin eisini tøkur at brúka hjá kommunum.“

### Betri eftirlit

Eitt økið, sum verður styrkt í komandi ári, er eftirlitið við, um stovnar keypa sambært rammusáttmálum.

Keyp landsins fær javnan dagføringar um landsins stovnar keypa í samsvar við rammusáttmálan.

Við ársenda er ætlanin at gera ein sokallaðan compliance lista, har yvirlit fæst um stovnar hava fylgt verandi rammusáttmálum.



SANSIR